# Konseptbilur við BMW Isetta sum fyrimynd



Nissan Pivo2 er ein hátøkniligur el-bilur



BMW Isetta og Nissan Pivo2, ovast høgrumegin, hava nokk so nógv til felags. Á báðum bilunum er inngongdin inn í kabinuna gjøgnum eina stóra hurð framman á bilinum



Eins og á BMW Isetta er inngongdin í kabinuna gjøgnum forhurðina



Kabinan kann snarast soleiðis, at bilurin koyrir eftir síðuni

## Nissan konseptbilurin Pivo2, sum verður sýndur fram á Tokyo Motor Show, minnir nógv um kabinuskutaran BMW Isetta, sum varð væl umtóktur fyri umleið 50 árum síðan

Hóast teir ikki kunnu samanberast á tekniska økinum, hava konseptbilurin Nissan Pivo2 og BMW Isetta nógv til felags hvat designinum viðvíkur.

BMW Isetta sum varð gjørdur frá miðskeiðis í 50-unum til 1962. Talan var um ein innilokaðan skutara við trimum hjólum og tveimum sitiplássum, ein sonevndan kabinuskutara.

Nissan Pivo2 er ein hátøkniligur el-bilur, sum faktiskt eisini er ein persónligur robottur.

Eitt nú kann kabinan snarast soleiðis, at bilurin koyrir eftir síðuni.

Á báðum bilunum er inngongdin inn í kabinuna gjøgnum eina stóra hurð framman á bilinum, og róðrið fylgir við, tá hurðin verður latin upp.

mg



Róðrið fylgir við, tá hurðin verður latin upp




BMW Isetta politibilur




BMW 600 er ein Isetta við fýra hjólum